# Köksveitsla



Veitslan fyri eftirkomarar hjá Hans Peturi og Elspu í Kökinum í Norðragötu verður í bygdarhúsinum í Leirvík Dýra Biðidag 30 apríl 2010.
Veitslan verður fyri systkinabörnum og trímenningum við maka.

Kvittan fyri luttökugjald er samstundis fráboðan um luttöku.
Luttökugjaldið á 275 krónur skal flytast á konto 6460.182.995.7 í Föroya banka seinast 18. apríl 2010.

Um spurningar eru, ber til at ringja til
Eli Eriksson +298212780
Árant Hansen +298222717
Jónheðin H. Tróndheim +298215721

Veitslan byrjar við lestri í kirkjuni í Norðragötu klokkan 1200, og veitslan byrjar í bygdarhúsinum klokkan 1400.

Sosialurin FØROYABANKI

The North Atlantic Group in the Danish Parliament
Atlantikup Avannaani Suleqatigiit
Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi
Den Nordatlantiske Gruppe i Folketinget

Fyrilestur og kjak í Miðlahúsinum 1. mars kl. 19.00

## Á VEG MÓTI EINUM SJÁLVBERANDI BÚSKAPI

Frágreiðing um búskaparpolitiskar forðingar og møguleikar

**Frágreiðingin viðgerð millum annað hesar spurningar:**

- Hvussu er samanhangurin millum politikk, vinnu, ríkisveiting og búskap?
- Forðar ríkisveitingin fyri størri útflutningsvinnu?
- Ber fiskivinnan øllum føroyska samfelagsbúskapinum?
- Kann fiskivinnan kasta meira av sær – og hvørjar eru tær politisku forðingarnar?
- Hvat hendir, tá vit skera ríkisveitingina – og hvat hendir, um vit ikki gera tað?

Á kjakfundi í Miðlahúsinum fer Jóannes Jacobsen at leggja fram sínar greiningar og niðurstøður og at svara spurningum.




Tórsgøta 1 · Tel 34 18 00 · Fax 34 18 01
post@sosialurin.fo · www.sosialurin.fo

miðlahúsið í Vágsbotni

HEILSUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF HEALTH AFFAIRS

# Fulltrúi til Heilsumálaráðið

Lýst verður eftir fulltrúa til setan í Heilsumálaráðnum at byrja skjótast til ber.

**Starvið umfatar**
Sum fulltrúi í Heilsumálaráðnum verða uppgávur tínar at ansa eftir og hava eftirlit við útreiðslunum til serviðgerð uttanlands og málsviðgerð í hesum sambandi, at ráðgeva stovnsleiðslum um fíggjarviðurskifti, umframt at vera við til at gera konsekvensútrokningar av lógum og øðrum fyriskipanum innan Heilsumálaráðið sum heild.

**Førleikakrøv**
Tú hevur viðkomandi fíggjarliga, roknskaparliga ella samfelagsliga útbúgving frá hægri lærustovni, ella aðra viðkomandi útbúgving.

Starvsroyndir frá miðfyrisitingini ella aðrar fíggjarligar starvsroyndir er ein fyrimunur.

Harumframt vænta vit, at tú hevur góðan kunnleika til teldur, umframt royndir, hug og evni at arbeiða við útrokningum, hagtølum og málsviðgerð annars. At tú hevur góð samstarvsevnir og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

**Avbjóðandi starv**
Starvið sum fulltrúi í Heilsumálaráðnum er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Starvið er sjálvstøðugt, og tú fært góðar møguleikar fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanin fevnir um Heilsumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

**Nærri upplýsing**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Turid Arge, deildarstjóra, telefon 30 40 50, ella teldupost: turid.arge@hmr.fo.

**Umsókn**
Umsókn við avriti av prógvum o.ø. skal sendast til: Heilsumálaráðið, Eirargarður 2, FO-100 Tórshavn.

**Freist**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. mars 2010, kl. 12:00.

Eirargarður 2 · 100 Tórshavn · tel 30 40 50 · fax 35 40 45 · hmr@hmr.fo · www.hmr.fo

STILLADS LEIGA
Absolutt bíligast!



GUTTORM MORTENSEN
www.stilladsleiga.com
TELEFON 25 11 60

Íslendskt úrvals HOYGGJ

LANDSHANDILIN
Telefon 311385
www.landshandilin.fo

## 2 generatoranlegg til sølu
34 kW v/luftkøling



Motorar: Deutz "F4L912", Diesel. Talva, útstoyt og luftkanal vm. eru ikki við.

Generatorar: AVK "DSG 29M 2-4", 3x400/230 volt, 50 Hz. Talva vm. er ikki við.

Anleggini er frá 1995 og hava koyrt 36.000 og 43.000 tímar. Verða seld hvør sær til hægstbjóðandi, um nøktandi boð fæst.

**Áhugaði kunnu venda sær til Asbjørn Østerø, Dagligur Leiðari, 219055, aos@frv.dk**

FARVANDSVÆSENET
Danish Maritime Safety Administration